menta
skrásettir grannskoðarar

# Parasport Føroyar

# Tórshavn

# Ársfrásøgnin

# 2023

01.01.2023 – 31.12.2023

Til Menta Sp/f

Ársfrásøgnin framløgd og góðkend á aðalfundi tann 13. mars 2024

fundarstjóri

# INNIHALDSYVIRLIT


| | Síða |
|---|---|
| Upplýsingar um felagið | 2 |
| Leiðsluátekning | 3 |
| Átekning frá óheftum grannskoðara | 4 |
| Nýttur roknskaparháttur | 6 |
| Rakstrarroknskapur | 8 |
| Fíggjarstøða | 9 |
| Sundurgreiningar til innanhýsisroknskapin | 10 |

# UPPLÝSINGAR UM FELAGIÐ

| | | |
|---|---|---|
| **Felagið** | Parasport Føroyar<br>ÍSF-húsið, á Frælsinum<br>FO-110 Tórshavn | |
| | Telefon:<br>T-postur:<br>Heimasíða: | +298 31 75 79<br>parasport@parasport.fo<br>www.parasport.fo |
| | Stovingardagur:<br>Roknskaparár: | 10. apríl 1980<br>1. januar til 31. Desember |
| **Dagligur leiðari:** | Tróndur Ravnsfjall, leiðari og ítróttarráðgevi | |
| **Nevnd** | Petur Elias Petersen, formaður<br>Tóra Norðgerð, varaforkvinna<br>Hans Karl Højgaard, skrivari<br>Anna Gaardlykke, nevndarlimur | |
| **Grannskoðari** | MENTA<br>skrásettir grannskoðarar Sp/f<br>J. Broncksgøta 16<br>Postboks 16, FO-110 Tórshavn<br>Telefon 780 900, Telefax 319 640<br>t-postur: menta@menta.fo<br>www.menta.fo | |

menta
skrásettir grannskoðarar

## LEIÐSLUÁTEKNING

Leiðsla felagsins hevur í dag viðgjørt og endaliga viðtikið ársfrásøgnina fyri 2023 hjá Parasport Føroyar.

Ársfrásøgnin er sett upp samsvarandi løgum felagsins og tillagað ásetingunum í galdandi føroyskum roknskaparleiðbeiningum. Ársfrásøgnin er gjørd í samsvari og niðanfyristandandi nýttum roknskaparhátti. Umframt eftir kunngerð nr. 125 frá 19. september 2011 um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi soleiðis, at ársfrásøgnin gevur eina rætta mynd av ognum, skyldum, fíggjarligu støðuni, úrsliti av virksemi felagsins í roknskaparárinum og at felagið hevur nóg gott gjaldføri til framhaldandi rakstur.

Ársfrásøgnin verður løgd fyri aðalfundin við tilmæli um góðkenning.

Tórshavn, tann 13. mars 2024

Leiðari: Tróndur Ravnsfjall
*leiðari*

Nevnd: Petur Elias Petersen
*formaður*

Tóra Norðgerð
*varaforkvinna*

Hans Kari Højgaard
*skrivari*

Anna Gaardlykke
*nevndarlimur*

## GRANNSKOÐANARÁTEKNING FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARA

**Til nevndina í Parasport Føroyar.**

**Niðurstøða**
Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Parasport Føroyar fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2023 við rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum, íroknað nýttum roknskaparhátti. Ársroknskapurin er gjørdur eftir niðanfyri ásettu roknskaparreglum. Umframt eftir kunngerð nr. 125 frá 19. september 2011 um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan.

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu tann 31. desember 2023 og av úrslitinum av virksemi felagsins í roknskaparárinum 1. januar – 31. desember 2023 samsvarandi nýttu roknskaparreglum.

**Grundarlag undir niðurstøðuni**
Grannskoðanin er løgd til rættis í samsvari við altjóða standardir fyri grannskoðan og aðrar ásetingar í føroysku grannskoðanarlóggávuni. Okkara ábyrgd eftir hesum standardum og ásetingum er neyvari útgreinað í brotinum niðanfyri "Ábyrgd grannskoðarans fyri at grannskoða ársroknskapin". Vit eru óheft av felagnum í samsvari við altjóða etisk krøv fyri grannskoðarar (etisku reglurnar hjá IESBA) og aðrar ásetingar, sum eru galdandi í Føroyum, og hava fylgt etisku skyldunum, sum ásettar eru í hesum standardum og krøvum. Okkara fatan er, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

**Nevndarábyrgd**
Nevndin hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við nýttu roknskaparreglum. Nevndin hevur harumframt ábyrgdina av tí innanhýsis eftirliti, ið nevdnin metir krevst fyri, at ársroknskapurin kann verða gjørdur uttan týðandi skeivleikar, sama um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ið ársroknskapurin verður gjørdur, er tað ábyrgd nevndsins at meta, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum, og, har tað hevur týdning, at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri, at gera ársroknskapin eftir roknskaparásetingunum um framhaldandi rakstur, uttan so at nevndin hevur í hyggju at avtaka felagið, steðga rakstrinum ella, at nevndin í roynd og veru ikki hevur annan møguleika.

**Ábyrgd grannskoðarans fyri at grannskoða ársroknskapin**
Okkara endamál er at fáa grundaða vissu fyri, at ársroknskapurin í síni heild ikki hevur týðandi skeivleikar, sama um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum og at gera eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er ikki full trygd fyri, at ein grannskoðan, sum er gjørd eftir ásetingunum í altjóða standardum um grannskoðan, og ásetingunum í føroysku grannskoðanarlóggávuni, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, um teir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað av sviki ella mistøkum og mugu metast at vera týðandi, um sannlíkindi eru fyri, at tey hvør sær ella saman ávirka tær fíggjarligu støðutakanir, sum roknskaparbrúkararnir taka við støði í ársroknskapinum.

Sum ein liður í grannskoðanini, ið verður gjørd eftir altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, gera vit yrkisligar metingar og hava eitt yrkisligt ivingarsemi undir grannskoðanini. Har vit eisini:

- Eyðmerkja og meta um váðan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, sama um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og gera tær grannskoðanargerðir, sum hesir váðar krevja, og fáa til vega tey grannskoðanarprógv, sum eru neyðug og egnað sum grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri at týðandi skeivleikar, sum standast av sviki, ikki verða avdúkaðir, er hægri enn týðandi skeivleikar, sum standast av mistøkum, tí svik kann vera av samanløgdum ráðum, skjalafalsan, tilætlaðari dyljan, villleiðingum ella við at skúgva innanhýsis eftirlitið til viks.

- Fáa innlit í innanhýsis eftirlitið, sum hevur týdning fyri grannskoðanina fyri at leggja tær grannskoðanaratgerðir til rættis, sum eru nøktandi til umstøðurnar, men ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum.

- Taka støðu til, um tann roknskaparháttur, sum nevndin nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingarnar og viðheftu upplýsingarnar, sum nevndin hevur gjørt, eru rímiligar.

- Taka støðu til, um tað er rímiligt, at nevndin hevur gjørt ársroknskapin við støði í roknskaparásetingunum um framhaldandi rakstur, og um tað við støði í teimum grannskoðanarprógvum, sum eru fingin til vega, er týðandi óvissa í sambandi við atgerðir og viðurskifti, sum kunnu hava við sær týðandi óvissu, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum. Um okkara niðurstøða er, at tað er ein týðandi óvissa, skulu vit vísa á hesi viðurskifti í ársroknskapinum í niðurstøðu okkara ella, um hesar ávísingarnar ikki eru nóg mikið, tillaga okkara niðurstøðu. Niðurstøður okkara byggja á tey grannskoðanarprógv, sum vit hava fingið fram til dagfestingina á okkara grannskoðanarátekning. Hendingar í framtíðini ella onnur viðurskiftir kunnu tó føra við sær, at felagið ikki longur megnar at halda fram við rakstrinum.

- Taka støðu til ta samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í ársroknskapinum, eisini upplýsingarnar í notunum, og um ársroknskapurin vísir tey grundleggjandi handilsviðurskifti og hendingar á ein slíkan hátt, at ein rættvísandi mynd fæst.

Vit samskifta við nevndina um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini, og nær grannskoðað verður, og eisini um týðandi eyleiðingar, herundir um møguligar týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, sum vit hava eyðmerkt undir grannskoðanini.

Tórshavn, tann 13. mars 2024

**MENTA Sp/f**
Skrásett grannskoðaravirki

Alvi S. S. Nielsen
skrásettur grannskoðari

# NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR

**Alment**
Ársfrásøgnin er gjørd eftir niðanfyri ásettu roknskaparrelgum. Umframt eftir kunngerð nr. 125 frá 19. september 2011 um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan. Roknskaparhátturin er óbroyttur frá í fjør.

Ársfrásøgnin verður gjørd í donskum krónum (DKK). Allar upphæddir í ársfrásøgnini verða avrundaðar til heil tøl, og tí kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og summi av teimum undirliggjandi tølunum.

**Um innrokning og virðisáseting**
Inntøkur verða rakstrarførdar so hvørt, sum tær verða vunnar. Sama er við virðisjavning á fíggjarligum ognum og skyldum. Allur kostnaður, ið hoyrir árinum til, við tíðaravmarkingum svarandi til roknskaparárið, verður rakstrarførdur við av- og niðurskrivingum, avsettum skyldum og afturføringum frá broyttum roknskaparligum metingum, ið áður eru innroknaðar í roknskapin.

Ognir og skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at framtíðarfíggjarligir fyrimunir fara at koma felagnum til góðar, og virðið á ognunum og skyldunum kann metast álítandi. Ognir og skyldur verða fyrstu ferð tiknar við til útveganarvirðið, og eftir tað verður hvør roknskaparpostur viðgjørdur sum gjøllari lýst niðanfyri.

Ávísar fíggjarligar ognir og skyldur verða virðismettar til niðurgoldið (amortiserað) útveganarvirði, tá ið føst effektiv renta verður roknað yvir tíðarskeiðið. Amortiserað útveganarvirði verður gjørt upp sum upprunaútveganarvirði við frádrátti fyri møguligum avdrátti umframt til-/frágongd fyri samlaðari amortisering av muninum ímillum útveganarvirði og áljóðandi upphædd.

Tá ið ognir og skyldur verða innroknaðar og virðismettar, verður lagt upp fyri væntaðum tapi og váða, ið vísa seg, áðrenn ársroknskapurin er liðugur, og sum avsanna ella sanna viðurskifti, ið komu til greinar við ársfrásagnarframløgu.

Møgulig marknaðarlig virðisminking á ognum í árinum verður mett ikki at verða varandi.

## Rakstrarroknskapurin

**Inntøkur**
Inntøkur verða tiknar við í rakstrarroknskapin so hvørt sum tær verða staðfestar. Stuðul og aðrar sáttmálainntøkur verða tiknar við tá hesa eru játtaðar og verða tíðaravmarkaðar.

**Rakstrarkostnaður**
Allur rakstrarkostnaður til høvuðsrakstur felagsins, ið hoyrir árinum til við tíðaravmarkingum, verður rakstrarførdur svarandi til rakstrarárið.

**Starvsfólkakostnaður**
Starvsfólkakostnaður er lønir, samsýningar, frítíðarlønir, eftirlønir og almenn lønargjøld umframt annar starvsfólkakostnaður. Møgulig lønarendurgjøld eru mótroknað.

**Fíggjarpostar**
Fíggjarligar inntøkur og kostnaður, ið hoyrir árinum til við tíðaravmarkingum, verður rakstrarførd svarandi til rakstrarárið. Fíggjarpostar eru rentuinntøkur og rentukostnaður.

## Fíggjarstøða

### Áogn
Áogn verður tikin við til niðurgoldið (amortiserað) útveganarvirði, ið vanliga svarar til áljóðandi virði, við frádrátti og niðurskriving ímóti tapi.

### Tíðaravmarkingar
Tíðaravmarkað ogn er rakstrarkostnaður, ið hoyrir til komandi ár. Tíðaravmarkingar skyldur, er inngjøld sum viðvíkja inntøkum í komandi roknskaparári.

### Tøkur peningur
Tøkur peningur er kassa-, gjaldskort- og innlánspeningur.

### Fremmand skuld
Øll stuttfreistað skuld verður tikin við til niðurgoldið (amortiserað) útveganarvirði, ið vanliga er áljóðandi virðið roknskapardagin.

# Rakstrarroknskapur

1. januar - 31. desember

| | Nota | 2023 | 2022 |
|---|---|---|---|
| **Inntøkur** | | | |
| Stuðulsinntøkur | 1 | 1.555.350 | 1.513.170 |
| Special Olympics | 3 | 66.872 | 126.000 |
| Úrvals ítrótt | 4 | 0 | 150.000 |
| Altjóða kappingar | 6 | 0 | 2.000 |
| Steypa og Grand Prix kappingar | 7 | 0 | 1.100 |
| | | **1.622.222** | **1.792.270** |
| **Útreiðslur** | | | |
| Paraítróttir | 2 | -284.940 | -243.665 |
| Special Olympics | 3 | -341.733 | -410.099 |
| Úrvals ítrótt | 4 | 0 | -155.168 |
| Breddaítróttur | 5 | -243.009 | -63.146 |
| Steypa- og grandprix kappingar | 7 | -2.820 | -4.726 |
| Altjóða fundir og skeiðvirksemi | 8 | -185.161 | -126.035 |
| Felagskostnaður | 9 | -164.690 | -169.048 |
| Fyrisitingarkostnaður | 10 | -68.596 | -49.789 |
| **Bruttoúrslit** | | **331.271** | **570.594** |
| Starvsfólkakostnaður | 11 | -568.952 | -541.586 |
| **Rakstrarúrslit** | | **-237.681** | **29.008** |
| Fíggjarkostnaður o.t. | | -994 | -4.098 |
| | | -15% | 2% |
| **Úrslit, áðrenn skatt** | | **-238.675** | **24.910** |
| **Ársúrslit** | | **-238.675** | **24.910** |
| | | | |
| **Uppskot frá leiðsluni at býta ársúrslitið:** | | | |
| Flutt úrslit frá undanfarnum árum | | 1.084.019 | 1.059.109 |
| Ársúrslit | | -238.675 | 24.910 |
| **Úrslit at flyta til næsta ár** | | **845.344** | **1.084.019** |

# FÍGGJARSTØÐA PR. 31. DESEMBER

| OGN | Nota | 2023 | 2022 |
|---|---|---|---|
| Meirvirðisgjald | | 970 | 579 |
| **Áogn** | | **970** | **579** |
| Tøkur peningur | | 844.374 | 1.086.565 |
| **Ogn í umferð** | | **845.344** | **1.087.144** |
| **OGN SAMANTALT** | | **845.344** | **1.087.144** |

| SKYLDUR | | | |
|---|---|---|---|
| **Felagskapitalur** | | | |
| Flutt úrslit, primo | | 1.084.019 | 1.059.109 |
| Ársúrslit | | -238.675 | 24.910 |
| **Eginpeningur** | | **845.344** | **1.084.019** |
| Vøru- og tænastuskuld | | 0 | 3.125 |
| **Stuttfreistað skuld** | | **0** | **3.125** |
| **Skuld** | | **0** | **3.125** |
| **SKYLDUR SAMANTALT** | | **845.344** | **1.087.144** |

menta
skrásettir grannskoðarar

# SUNDURGREININGAR TIL INNANHÝSISROKNSKAPIN

| | 2023 | 2022 |
|---|---|---|
| **Nota 1. Nettoinntøkur** | | |
| Stuðul, Ítróttarsamband Føroya | 839.721 | 838.038 |
| Stuðul, Føroya Landsstýri til ítróttarráðgeva | 300.000 | 300.000 |
| Stuðul, altjóða sambond | 143.221 | 117.038 |
| Stuðul, kommunur og onnur | 27.408 | 3.094 |
| Stuðul, aðrir | 245.000 | 255.000 |
| | **1.555.350** | **1.513.170** |

| | 2023 | 2022 |
|---|---|---|
| **Nota 2. Paraítróttir** | | |
| **Útreiðslur** | | |
| Lønir og samsýningar | -18.510 | -34.920 |
| Ferðing og uppihald innanlands | 0 | -2.350 |
| Ferðing og uppihald uttanlands | -215.200 | -167.983 |
| Klassifisering | -22.524 | -469 |
| Búnar o.l. | -15.803 | -15.939 |
| Ítróttarútgerð | -10.424 | -12.128 |
| Leiga av høli / vølli | -450 | -5.517 |
| Annað | -2.029 | -4.359 |
| | **-284.940** | **-243.665** |

| | 2023 | 2022 |
|---|---|---|
| **Nota 3. Special Olympics** | | |
| **Inntøkur** | | |
| Egingjøld | 66.872 | 52.000 |
| Innsavning | 0 | 74.000 |
| | **66.872** | **126.000** |
| **Útreiðslur** | | |
| Lønir og samsýningar | -181.728 | -57.490 |
| Ferðing og uppihald innanlands | -11.626 | -23.736 |
| Ferðing og uppihald uttanlands | -71.573 | -247.547 |
| Klassifisering | | |
| Búnar o.l. | -66.525 | -56.906 |
| Leiga av høli / vølli | -5.809 | -500 |
| Annað | -4.472 | -23.920 |
| | **-341.733** | **-410.099** |

**Nota 4. Úrvals ítróttur**

| | 2023 | 2022 |
|---|---|---|
| **Inntøkur** | | |
| Stuðul | 0 | 150.000 |
| | **0** | **150.000** |
| **Útreiðslur** | | |
| Venjaraløn | 0 | -11.500 |
| Venjarasamsýning | 0 | -7.560 |
| Ferðing og uppihald innanlands | 0 | -750 |
| Ferðing og uppihald uttanlands | 0 | -128.851 |
| Búnar o.l. | 0 | -5.312 |
| Annað | 0 | -1.196 |
| | **0** | **-155.168** |

**Nota 5. Breddaítróttur**

| | 2023 | 2022 |
|---|---|---|
| **Útreiðslur** | | |
| Lønir og samsýningar | -172.534 | -21.088 |
| Ferðing og uppihald innanlands | -1.939 | -3.784 |
| Ferðing og uppihald uttanlands | -36.741 | -33.102 |
| Búnar o.l. | -20.035 | -1.050 |
| Leiga av høllum / vøllum | -11.760 | 0 |
| Annað | 0 | -4.122 |
| | **-243.009** | **-63.146** |

**Nota 6. Altjóða kappingar**

| | 2023 | 2022 |
|---|---|---|
| **Inntøkur** | | |
| Egingjøld | 0 | 2.000 |
| | **0** | **2.000** |

**Nota 7. Steypa- og grandprix kappingar**

| | 2023 | 2022 |
|---|---|---|
| **Inntøkur** | | |
| Egingjøld | 0 | 1.100 |
| | **0** | **1.100** |
| **Útreiðslur** | | |
| Heiðursmerkir | -2.820 | -4.726 |
| | **-2.820** | **-4.726** |

**Nota 8. Altjóða fundir og skeiðvirksemi**

| | 2023 | 2022 |
|---|---|---|
| **Atljóða fundir** | | |
| Ferðing og uppihald | -98.153 | -103.976 |
| Annað | -12.012 | -4.560 |
| | **-110.165** | **-108.536** |

| Venjaraskeiðvirksemi | 2023 | 2022 |
|---|---|---|
| Samsýning fyri venjaraskeið | -1.700 | -2.160 |
| Tilfarð | 0 | -1.614 |
| Ferðing og uppihald | -33.030 | 0 |
| | **-34.730** | **-3.774** |

| Skeiðvirksemi | | |
|---|---|---|
| Samsýning fyri skeiðhaldara | -30.230 | -8.725 |
| Tilfarð | -6.373 | 0 |
| Annað | -3.664 | -5.000 |
| | **-40.267** | **-13.725** |

## Nota 9. Felagskostnaður

| | | |
|---|---|---|
| Ferðaútreiðslur | -11.345 | -28.508 |
| Fundarútreiðslur | -4.777 | -9.211 |
| Umboðan og ráðstevnur | -9.076 | -2.079 |
| Gávur og graveringar | -17.813 | -10.974 |
| Starvsnevndarfundir | -14.295 | -57 |
| Limagjøld | -27.658 | -51.513 |
| Tryggingar | -24.826 | -17.461 |
| Búnar o.l. | -10.625 | 0 |
| Ítróttarútgerð | 0 | -18.994 |
| Heimasíða og lýsingar | -43.686 | -19.235 |
| Annar kostnaður | -590 | -11.016 |
| | **-164.690** | **-169.048** |

## Nota 10. Fyrisitingarkostnaður

| Útreiðslur | | |
|---|---|---|
| Postgjald | -62 | 0 |
| Rakstrargøgn | -26.869 | -11.044 |
| Samskiftiskostnaður | -12.197 | -4.602 |
| Bókhald og grannskoðan | -32.156 | -35.281 |
| Flytingarkostnaður | -1.030 | -110 |
| Annar kostnaður | 0 | -2.305 |
| Lutvíst MVG | 3.718 | 3.553 |
| | **-68.596** | **-49.789** |

## Nota 11. Starvsfólkakostnaður

| | | |
|---|---|---|
| Lønir | -465.532 | -450.085 |
| Eftirlønir | -65.025 | -63.329 |
| Lønargjøld | -38.396 | -28.172 |
| | **-568.952** | **-541.586** |